# Nógv børn í Írlandi

Í Írlandi fáa kvinnurnar nú so mong børn sum næstan ongantíð fyrr. Hagtølini vísa,at í fjør komu 75.065 børn í heimin har, og tað er tað mesta í 112 ár, skrivar Reutersúr Dublin. Tað gamla metið var frá 1896, og tað árið komu 75.332 børn í veðrina í Írlandi. Hagtølini fyri árið í fjør vísa, at tað eru kvinnur í øllum aldri millum 20 og 49 ár, sum fáa fleiri børn nú enn fyrr. Hjá 40 prosentum av kvinnunum, sum áttu í fjør, var talan um teirra fyrsta barn., skrivar Reuters.



# Leita eftir minum

Londini við Eystrasalt hava gjørt av at leita eftir óbrostnum minum, sum liggja á havbotninum. Tann fyrsta leitingin byrjaði í gjár úti fyri estlendsku strondini, har nógvar óbrostnar minur ætlandi liggja. 16 skip úr fleiri londum taka lut í leitingini, og tey fáa hjálp frá servandum kavarum úr USA, Týsklandi og Estlandi. Síðani 1994 eru umleið 600 óbrostnar minur funnar á botni í estlendskum sjóøki, men serfrøðingar ivast ikki í, at fleiri eru eftir. Teir somu serfrøðingarnir halda, at einar 80.000 óbrostnar minur liggja á botni í Eystrasalti. Nógv tær flestu eru frá seinna heimsbardaga.

# bátur á vitjan





*Swan er eitt snøgt skip*



*Í lugarinum*

hoyrdi Swan heima í eini 50 ár. Hann fekk ikki motor fyrr enn í 1935, og aftan kríggið fiskaðu teir við nót.

## Bjargaður í síðstu løtu

Men sum frá leið hasaði hesin fiskiskapur av, og skipini fóru í hvør sína ætt. Fleiri teirra kom annars til Føroya, har tey vóru riggað um til snørisfiskiskap. Tey vóru nakað væl minni enn sluppirnar.

Tann 100 ára gamli Diurin Djurhuus úr Porkeri hevur í Miðvikuni greitt frá hesum parti av okkara fiskivinnusøgu.

Swan varð seldur til Grimsby, har hann varð nýttur sum húsbátur.

Men eigarin setti bátin til sølu, og tá hendi tað sama sum við sluppunum í Føroyum. Áhugin fyri at varðveita ein sildabát varð kveiktur, og Swan var seldur til Hetlands.

Hetta var í tøkum tíma, tí hetta var tann seinasti av 1.000 sildabátum. Men so skuldu pengar fáast at seta skipið í stand aftur. Sum við sluppunum í Føroyum gjørdist hetta dýrt, og tað gjørdist eisini nógv dýrari enn mett av fyrstu tíð. Men góðar kreftur spýttu í kassan. Kostnaðurin gjørdist ein 400.000 pund, og úrslitið sóu vit so hesar dagar. Skipið er stak snøgt og eitt prýði. Swan hevur síðan 1998 verið í síni nýggju "vinnu." Fyri ein stóran part hevur hann siglt við næmingum, og hann hevur verið víða um. Hann hevur siglt í skotsku fjarðunum, og so hevur hann eisini verið í Noregi og Føroyum.

Tað er ein grunnur sum rekur skipið. Tað er fastløntur skipari við. Hesin eitur Magnus Sinclair. Í sínum ungu søgum sigldi hann við frystilínuskipinum Fjalshamar, og tað bar ikki vandari á, at meðan vit tosaðu um hetta, kom "Helena", gamli Fjalshamar, inn móti bryggjuni. Swan verður brúktur til túrar av ymiskum slag. Gamla lastin er gjørd til lugar, so tað kunnu vera upp til einir 15 mans við, og tað var tað eisini hendan túrin.

### Føroyavinir

Stórur partur av monnunum umborð vóru úr Hetlandi, men onkur var eisini úr Orknoyggjunum og aðrir av skotska meginlandinum. Serliga teir úr Hetlandi harmaðust um, so vánaligt ferðasambandið var millum londini. Tað var tann tíð, tá ið tað bæði kundi siglast og flúgvast til Hetlands og eisini til Skotlands. Hetta samband er alt meira ella minni hildið uppat. Tí var tað kærkomið hjá fleiri teirra at kunna koma til Føroyar á hendan hátt. Við at práta við hesar menn kom eisini fram okkurt áhugavert. Ein av monnunum hevði kræklingaaling, sum gekk væl. Hann kundi hava upp til 20 fólk í arbeiði. Ein serligur føroyavinur, John Goodlad, var við hendan túrin.

Hann var kendur í nógv ár sum dagligur leiðari hjá hetlendska fiskimannafelagnum.

John hevur eisini verið politiskt virkin í sjálvstýrisfelagsskapinun Shetland Movement. Nú er hann virkin innan alivinnuna, sum eins og í Føroyum gongur væl í Hetlandi. Hann hevur ferðast til Føroya síðan hann var lesandi. Við sær hevði hann eisini systirson konuna, tann 17 ára gamli Calum Neilson, sum annars býr í Aberdeen.

Hann var ein sera dámligur drongur og var ógvuliga áhugaður í føroyskum viðurskiftum Saman vitjaðu vit gamla kirkjugarð og hugdu at hetlendskum fiskimannagrøvum. Ein frásøgn um hesar kemur í komandi part av Hendur ið Sleptu.

Blíðir vóru teir eisini umborð, og vit vóru fleiri føroyingar, sum vóru bodnir at eta døgurða saman við teimum. Byrjað varð við borðbøn, sum var siður umborð á skipunum.

Døgurðin var næstan sjálvsagt hetlendskt lambakjøt. Swan skuldi fara til onnur pláss í Føroyum at vitja, og teir eru nú komnir heim aftur. Tað var hugnaligt at síggja gamlar vinir aftur!